gult cyan magenta svart



# Føroyskur verkfrøðingur í alstjóða samstarvi

ÁKI BERTHOLDSEN

Ráðgevandi verkfrøðingafelagið Crone og Koch í Føroyum er nú yvirtikið á føroyskar hendur.

Tað er verkfrøðingurin Álvur Áarstein, sum nú hevur yvirtikið felagið, sum nú hevur yvirtikið Crone og Koch í Føroyum.

Crone og Koch var eitt stórt, danskt ráðgevandi verkfrøðingafelag, men fyri hálvum øðrum ári síðani varð tað lagt saman við eitt annað stórt verkfrøðingavirkið, Carlbro.

Crone og Koch hevur í fleiri ár havt deild í Føroyum og tað er hesa deildina, sum Álvur Áarstein nú hevur yvirtikið.

Samstundis hevur virkið fingið navnið Vericon P/F Ráðgevandi verkfrøðingar.

Álvur Áarstein sigur, at í sambandi við yvirtøkuna hevur hann gjørt formliga sam avtalu við Carlbro um tvørfakligt samstarv í sambandi við seruppgávur í Føroyum. Men harumframt gevur ber avtalan eisini í sær, at Vericon fær lut í uppgávum, sum Carlbro hevur úti í heimi.

Harafturat stendur føroyska felagnum eisini í boðið at senda fólk á eftirútbúgvingar ígjøgnum hendan sama Carlbro.

Tað arbeiða um 2.300 fólk hjá Carlbro í Danmark og hetta ger tað til eitt hitt største ráðgevandi virki í landinum.

Álvur Áarstein sigur, at samstarvið við Carlbro er eisini portur út í heimin, tí tað umfatar eisini Carlbro International, sum hevur deild og skrivstovu í fleiri londum.

Hann dylir ikki fyri, at hann væntar sær nógv av samstarvinum við Carlbro. Sum verkfrøðingur hjá Crone og Koch hevur hann havt neyvt samstarv við Carlbro øll nítíárini og hann hevur fleiri ferðir verið við í projektum hjá teimum uttanlands. Sostatt er hann komin at kenna fleiri av starvsfólkunum og tað heldur hann er ein stórur fyrimunur.

Álvur Áarstein sigur, at við hesi samstarvsavtaluni ber tað til hjá Vericon at bjóða viðskiftafólki og øðrum ráðgevandi virkjum tænastur á øllum økjum í byggivinnuni, men teir hava eisini royndir og kunnleika á serøkjum.

# Vágbingar bjarga døgverðanum á Ólavsøku

*Lundi er forkunnugur døgverðamatur, men nú eru vágbingar komnir til Havnar við 4.000 lundum, sum teir fara at selja niðri á Bursatanga*




*Nú er ólavsøkudøgverðin bjargaður. Eftir ætlan skuldi vágsskipið, Maj, leggja at í Havnini á midnátt í gjárkvøldið eftir at hava verið á lundaveiði. Í frystigoymsluni hava teir einar 4.000 lundar, sum teir nú fara at selja niðri á Bursatanga*

ÁKI BERTHOLDSEN

Ein spurningur, sum mangan vísir seg at verða trupul at loysa í hesum døgum er: Hvat skulu vit hava til døgverða á Ólavsøku?

Men nú er ólavsøkudøgverðin bjargaður hjá mongum.

Og hjálpin, hon kemur heilt sunnan úr Vági.

Tí seint í gjárkvøldið legði vágsskipið Mai at bryggju í Havn.

Í frystigoymsluni hava teir ikki færri enn 4.000-5.000 lundar, sum teir fara at selja av skipinum, sum liggur á Bursatanga.

Hetta eru lundar, sum Mai hevur keypt í Vestmannaoyggjunum, har teir eisini fleyga nógvan lunda.

Lundin er royttur og frystur. Men teir hava eisini nakrar óroyttar lundar til tey, sum heldur vilja royta sjálvi.

Tá ið vit høvdu samband við Mai á miðdegi í gjár vóru teir góðar 70 fjórðingar úr landi, so hoyrilíkindini vóru sera vánalig.

Men tað skilst, at endaligi prísurin er ikki ásettur enn, men at hann verður í mesta lagi 30 krónur fyri lundan.

**Forkunnugur døgverði til Palliba**

Sostatt kunnu havnarfólk fáa forkunnugan døgverða á Olavsøku.

Men tað skilst á lagnum, at tey, sum ikki vilja vera við sviðusoð, skulu skunda sær, tí hina báðu ferðinar, Mai hevur selt fugl, hevur gravgangur verið eftir honum og hann hevur gingið sum heitt breyð.

Hetta er sostatt triðju ferð, at Mai hevur fugl til sølu.

Fyrst seldu teir vetrarnáta, sum tað gekk skjótt at sleppa av við.

Og nýliga vóru teir eisini í landi og seldu lomviga og tað stóð heldur ikki á at sleppa av við teir 9.000 lomvigarnar, teir høvdu.

Tað eru nú nakað síðani, at vágbingar riggaðu Mai til at veiða fugl.

Fuglur hevur í nógv ár verið ógvuliga forkunnugur døgverðamatur hjá føroyingum, men endamálið við hesi ætlanini var júst at seta forkunnugan mat á døgverðaborðið hjá meiniga føroyinginum, sigur Kaj Joensen, ið er ein av teimum, sum eiga Mai.

Eftir Ólavsøku ætla teir sær yvir aftur til Íslands eftir lunda. Tilsamans ætla teir sær at taka einar 20.000 lundar

Síðani ætla teir sær eisini eftir nátungum. Ætlanin er at liggja framvið landi og keypa nátunga frá bátunum, sum eru úti. Og í vetur er eisini ætlanin at halda fram við vetrarnátanum.

Tað er nú nakað síðani, at vágbingar riggaðu Mai til at veiða fugl.

Teir hava allar góðkenningar, sum krevjast og eisini Norðuratlantiska samstarvið, NORA, hevur hildið ætlanina vera so áhugaverda, at felagsskapurin hevur stuðlað henni fíggjarliga.

Kaj Joensen sigur, at higartil eru teir vælnøgdir við hesa royndina.

Fimm mans eru við Mai og teir fáa tað at mala runt.

# Ikki tað stóra í Stóru Dímun

ÁKI BERTHOLDSEN

Hetta er besta tíðin at fleyga lunda og kring alt landið eru stengurnar á lofti.

Men tað er ymiskt, hvussu tað hevur hilnast.

Í Sosialunum nú um dagarnar frættist, at tað hevði vignast avbera væl á Viðareiði.

Eitt annað av teimum góðu lundaplássunum er Stóru Dímun, men har hevur tað ikki gingið heilt ov væl higartil í ár.

Óla Jákup úr Dímun, bóndi, sigur lundafleygið í ár hevur ikki verið av tí besta.

–Ættin hevur ikki verið heilt til vildar, sigur hann.

Hann skal helst verða ílandsynningur ella útsynningur fyri at fáa lunda á suðursíðuni á oynni. Og tað er mest har teir fleyga, tí tað er høgligast við tað, at sessirnar eru beint við húsini.

Sessirnar eystanfyri og norðanfyri verður helst ikki farið í, uttan at tað næstan er av neyð, tí tað er so langt og trupult at ganga og tað er eitt knoss at fáa veiðina til húsa.

Óla Jákup úr Dímun sigur annars, at tað er nokk av lunda til, men tað hevur bara viðrað so illa, at enn hevur hann ongan av teimum heilt grovu døgunum havt.

–Tað plaga altíð verða onkrir dagar, har vit fáa yvir einar 400 lundar, men teir hava vit so til góðar enn.

Enn hava teir „bara“ fingið gott hundrað og gott tveyhundrað lundar, hóast tet onkuntíð hava havt bæði tvær og tríggjar stengur.

Tó sigur Dímunarbóndin, at teir hava eisini nógv annað at takast við og tí dríva teir ikki lundafleygið heilt so hart, sum gjørt verður onkra aðrastaðni í landinum.

Tað er bæði rakstur, súrhoyggj og annað, sum skal fáast frá hondini, so tá ið lítið er at fáa, fara teir úr bakkanum aftur at fáast við okkurt annað, sum er meiri átrokandi.

– Sótu vit í bakkanum allan dagin, høvdu vit eisini fingið meir, men tað hava vit ikki umstøður til, sigur Óla Jákup.

Men hann ivast kortini ikki í, at teir góðu dagarnir munnu fara at koma, tí enn eru tríggjar vikur eftir av fleygingatíðini.